tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Tjóðskaparrørsla - arbeiðararørsla

Oddagrein

Flestu føroyingar halda, at tjóðskaparrørslan hevur havt stóran týdning. Hetta síggja vit í hesi tjóðskaparligu rembingartíð, og nú undan ársskiftinum, tá fólk vórðu spurd, hvat hevur havt stóran søguligan týdning.

Nakarar av fruktunum hjá tjóðskaparrørsluni er føroyska málið, sum ikki var javnsett við danskt fyrr enn við heimastýrislógini í 1948. Ein onnuir er føroyska flaggið, sum fekk eina fyribilsgóðkenning í 1940, tá annar heimsbardagi forðaði okkum at brúka danska flaggið. Ein triðja frukt er, at vit eru vorðin meiri tilvitandi um føroyskar siðir, føroyska mentan og eru meiri tilvitandi um ein føroyskan samleika.

Hetta hevur alt týdning, um vit skulu menna okkum sum tjóð. Sjálvt sambandsmenn kunnu ídag taka undir við teimum setningum, sum tjóðskaparrørslan setti sær at virka fyri fyri góðum hundrað árum síðani, hóast teir í síni tíð bæði vóru í móti føroyskum málstrevi og føroyskum flaggi.

Politiska toganin á Tingi millum Sjálvstýrisflokkin og Sambandsflokkin fyrsta fjórðingin av hesi øldini er prógv um tað, og hon er prógv um, at onnur mál, sum høvdu meiri við dagliga lívið hjá føroyinginum at gera, ikki fingu innivist í politiska arbeiðnum, hóast nakrir sjálvstýrismenn vóru meiri tilvitandi um sosialu støðuna í landinum.

Víst hevur tjóðskaparrørslan havt týdning, men líkt er til, at fólk gloyma tann ovurstóra týdning, sum tann føroyska arbeiðararørslan hevur havt fyri føroyingin. Vit hvødu ídag bart út ikki havt tað samfelag, sum vit hava, um arbeiðararørslan ikki av álvara fekk fótin fyri seg miðskeiðis í tjúgunum og av álvara fekk politiskan týdning síðst í fimtiárunum.

Tann hugsjón, sum fakfeløgini og javnaðarflokkurin løgdu fram í seinri helvt í tjúgunum, er í dag grundvøllurin undir tí vælferðarsamfelag, sum tey flestu í dag taka undir við, og halda vera sjálvfylgjur. Tað veri seg bæði á almannaøkinum og heilsuøkinum, innan skúla og útbúgving, viðvíkjandi mentan og vinnuliga. Samfelagsviðurskifti, sum fólk so seint sum í fimtiárunum bara droymdu um, eru ídag sjálvfylgjur, sum slóðararnir í arbeiðararørsluni stríddust fyri í eitt heilt mannaminni, áðrenn teir fingu nóg dygga politiska undirtøku. Uttan at seta

hesar rørslur upp ímóti hvørjum øðrum, tí tær hava bæði samrunnið og samvirkað, so kann sláast fast, at tjóðskaparrørslan hevur havt týdning á sínum øki, men at arbeiðararørslan hevur sanniliga havt sín stóra týdning fyri tað lív og virki, sum føroyska samfelagið í dag kann veita føroyingum!

Sosialurin

Viðmerking:

Missir Javnaðarflokkurin mál síni á gólvið?

Mangt bendir á, at vit í Javnaðarflokkinum eru ov lin ella dovin, tá tað snýr seg um at standa saman um mong av teimum góðu málunum.

Nýggj kommunuskipan
Í Javnaðarflokkinum hava vit leingi sæð, at neyðugt var at gera ein nýggjan kommunubygnað í hesum landi. Flokkurin valdi nøkur fólk at arbeiða við hesum.

Álit kom frá bólkinum, og tað fekk góða undirtøku og viðgerð millum flokslimirnar. Uppskotið varð einmælt samtykt á landsstevnu floksins í Trongisvági 1997. Á landsstevnuni í læraraskúlahøllini árið eftir varð samtyktin aftur viðgjørd, og har løgdu flestir luttakarar dent á, at neyðugt verð at leggja ætlanina so tíðliga fram, at hon fekk ta neyðugu viðgerðina manna millum, so hon kundi búnast. Men enn røkist einki fyri nakrari almennari umrøðu ella viðgerð av hesum máli.

Fjølmiðlarnir viðgera málini men ikki okkara
Dag og dagliga hoyra vit um týdningarmikil mál í fjølmiðlunum, men umtalan er grundað á dagsskránna hjá samgonguni, og ætlan Javnaðarfloksins sýnist ikki at vera til. Millum fólk sýnist, sum ætlanin hjá landsstýrissamgonguni, og uppskotið hjá Eilif Samuelsen er einasti og óvikandi háttur at skipa kommunurnar í framtíðini.

Eru vit samd?
Eru vit samd við landsstýrissamgonguna og kommunubólkin hjá Eilif um nýggjan kommunubygnað, so er sjálvsagt at tiga og samtykkja. Men flokkurin er ósamdur. Flokkurin hevur sítt egna uppskot, men duga vit at kunngera boðskap okkara so væl, at hann fær innivist í huganum á fólki? Eg haldi ikki. Duga vit ikki at gera málini áhugaverd hjá pressuni, so mugu vit leggja meiri orku í at læra okkum at gera fjølmiðlarnar varar við okkum. Tøgnin er dreptandi.

Vandi á ferð
Eg eri stórliga bangin fyri, at tey, eftir mínum tykki, vánaligu, ja, skaðiligu uppskotini hjá hinum bæði um støðuna í ríkinum og støðuna hjá teim føroysku kommununum eru við at fáa so fast tak í huganum á veljarunum, at tungt verður at broyta hugsan, tá tann avgerandi løtan kemur um ikki so langa tíð.

Okkara politikkur á dagsskránna nú
Okkara politikkur má koma á dagsskránna nú. Vit mugu fara út sum ein rødd at tala okkara sak ikki minst um kommunubygnaðin.

Ongin serstakan áhuga fyri kommunumálum?
Viðhvørt hugsi eg við mær sjálvum, at tað var illa, at vit ikki fingu ein einasta politikkara valdan á ting, sum hevur serstakan áhuga fyri kommunumálum. Eitt er so púra vist, at eydnast tað framvegis okkara mótstøðufólkum og pressuni at skíra javnaðarfólk at vera í móti øllum og ræðast alla nýskapan, so tapa vit, og tað er stór synd, tí ***vit hava framvegis tey bestu argumentini***.

Virknari flokk
Tað er tvingandi neyðugt, ja, lívsneyðugt, at okkara løgtingslimir fara nógv virknari til verka. Tey eru vald at tala okkara sak, vald at seta javnaðarmál á skránna. **At hopa undan krevur nógv meira orku enn at argumentera umaftur og umaftur fyri tí, tú trýrt uppá.**

Tingmanning burturav
Tingmanningin er nú tingmanning burturav. Alt annað starv er við nýggju skipanini hjáputur, sum bert kann styrkja førleikan í løgtingsstarvinum. Tí eigur flokkurin við tí dugnaligu manning, hann í grundini hevur á tingi, og við tí nógva dugandi fólkinum, hann eigur uttan tinggátt, at skipa seg, so at allir føroyingar vita, at **Javnaðarflokkurin** er virkin á øllum økjum, at einki mál er ov lítið, men at ein hópur av stórmálum, sum liggja á láni, mugu fáast fram í ljósið aftur. Tað kann ikki forsvarast, at vit lata alt tað góða, sum var bygt upp fer fyri bakka og allur framburður steðgar, ja, beinleiðis líðir tagnardeyðan, meðan samgongan heldur eldin brennandi við sínum fullveldistosi.

Tað ringasta, sum kann henda, er, at fólk síggja javnaðarumboðini á tingi sum grenj og afturhaldandi, tí tað yvirlivir ein javnaðarflokkur ikki.

Javnaðarhugsjónin skoðar altið frameftir
Javnaðarhugsjónin er í síni natúr skoðandi frameftir. Sjálvsagt skal ansast eftir, at oyðileggjandi kreftirnar sleppa ikki at bróta niður, men besta vápnið er framvegis at vísa á gongdar leiðir, ótroyttiliga at vísa á uppskot, sum gera umstøðurnar betri hjá vanliga fólkinum.

Pressan setur dagsskránna
Sum Kato á sinni fari eg at taka uppaftur og uppaftur.

Eg: Tað nyttar einki at hava tey bestu argumentini og tær bestu loysnirnar, um vit ikki samstundis eru nóg dugnalig at bera boðskapin út. Tann størsta uppgáva okkara sum flokki er nú at gera okkum áhugaverdar hjá pressuni, tí hon setur í øllum førum dagsskránna. Tað er hon, sum avger, hvat er áhugavert, og hvat skal viðgerast.

Okkara generatión í flokkinum hevur eina ómetaliga ábyrgd.

Hans Jørgensen

Dansað 13. kvøld í Skálavík

Leygarkvøldið kl. 20.00 bjóða dansifeløgini í Sandoynni til hugnaligt dansitiltak í húsinum hjá ungmannafelagnum í Skálavík. Stigtakararnir — Stígum Fast, Leikum Fagurt og Dansigaman — síggja fram til eitt væleydnað kvøld. Tiltakið er vorðið eitt afturvendandi *must* hjá dansiáhugaðum sandoyingum,ið fyri 5. ferð í eins mong ár leita sær til Skálavíkar. Serliga stuttligt er at síggja, at tilber at hava allar aldursbólkar samlaðar á sama stað við so framúr góðum úrsliti. Tann sokallaða generatiónskluftin er eingin forðing, tá ið hetta tiltak er í luftini.

Byrjað verður við einum borðhaldi, og so verður farið upp á gólv. Eftir føroyska dansin verður skift millum gamlamanna dans og føroyskan. Húsið í Skálavík er so avbera væl egnað til tílíkt tiltak, tí serstakt høli er til føroyskan dans. Samstundis ber væl til at hava annan dans í stóra salinum. Ikki hoyrist ímillum, so einki er í vegin fyri, at øll áhugaði kunnu velja og vraka sum teimum hugar. Borðreitt verður við kaffi/te og køkum alla náttina, so tey tystandi og svongu kunnu fáa sær styrk.

Bussar koyra úr øllum bygdum til Skálavíkar. Dansað verður til kl. 03.00, tá ið bussarnir standa klárir at koyra tey troyttu dansifólkini upp á pláss aftur.

Atgonumerki fáast í kioskunum í Sandoynni, og kostnaðurin fyri kvøldið er 100 kr.

Má umhugsa arbeiðsgongdina

Løgmaður skilir ikki, at tjóðveldismenn eru ímóti at mál verða gjølla viðgjørd millum samgonutingmenn, áðrenn tey koma fyri tingið

JOHN JOHANNESSEN

– Eg skilji ikki, at formaður Tjóðveldisfloksins er ímóti, at eg kunni tingfólk í samgonguni um lógaruppskot, áðrenn tey koma fyri í tinginum. Harafturat haldi eg, formaður Tjóðveldisfloksis langt síðani kundi havt sagt mær frá, um hann veruliga er ímóti hesum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, er skelkaður av útsagnunum hjá Heina O. Heinesen, formanni Tjóðveldisfloksins, í Sosialinum í gjár. Heni O. Heinesen segði nevniliga í viðtalu við Sosialin í gjár, at hann metir løgmann leggja upp til einaræði, tá hann vil hava lógaruppskot so gjølla viðgjørd sum møguligt millum samgongutingfólk, áðrenn tey koma fyri tingið

Heini O. Heinsen vísti á, at tá mál er liðugt viðgjørd og hálvgum samtykt millum samgongutingfólk áðrenn tey koma fyri tingið, hevur andstøðan lítlan og ongan møguleika fyri at hava ávirkan á uppskotini, og tískil er mannagongdin ódemokratisk.

Útsagnirnar hjá Heina O. Heinesen komu eftir tíðindafundin í Tinganesi týsdagin, har løgmaður í sambandi við ósemjuna viðvíkjandi pensjónsmálinum vísti á, at hann helt, at samgongutingfólk í størri mun áttu at leggja seg eftir at kunna seg um og viðgera lógaruppskot frá landsstýrinum, áðrenn tey koma fyri tingið.

Boðar til samgongufund
Løgmaður sigur tað vera púra nýtt fyri sær, at formaður Tjóðveldisfloksins er ímóti viðger av tingmálum millum samgongufólk, áðrenn tey verða send tinginum. Men meinar Heini O. Heinesen veruliga tað, hann sigur, kennir løgmaður tað sum, at hann ger sítt arbeiði til fánýtis.

– Eg brúki nógva tíð orku, og pening til at syrgja fyri, at samgongutingfólk verða kunnaði í góðari tíð um mál, áðrenn tey koma fyri tingið. Men eru limir í samgonguni ímóti hesum, dugi eg ikki at skilja, hvat vit hava samgonguna til. Tí tá verður mannagongdin bert tann, at uppskot verða tveitt í tingið, uttan at tey eru nóg væl viðgjørd.

Út frá hesum fer løgmaður at kalla inn til samgongufund. Hann vil hava greiðu á viðurskiftunum. Hann heldur, at nýggjur arbeiðsháttur má finnast sum skjótast, um samgongulimir veruliga eru ímóti verandi mannagongd. Men løgmaður leggur afturat, at eftir hansara tykki er tað ógvuliga løgi, at samgonulimir eru ímóti arbeiðsgongdini, sum hon er nú.

Andstøðan við
Løgmaður ásannar, at samgongutingfólk fáa fyrimun undir tingviðgerðini, tá tey hava viðgjørt uppskotini áðrenn tey koma í tingið. Tí hevur hann umhugsað eisini at senda lógaruppskot frá landsstýrinum til kunningar hjá andstøðulimum, áðrenn tey koma fyri tingið. Hann vísir á, at hann í ávísan mun longu hevur sett hesa mannagongd í verk. Dømi um hetta er, at uppskotið kommunulóg fyrradagin varð sent bæði andstøðu- og samgongulimum til ummælis.

Løgmaður stendur fast við, at nakað má vera galið við floksapparatunum, tí tá hann sendir uppskot út til kunningar, kemur sum oftast eingin afturmelding. Hann vísir á, at uppskotið um pensjónsskipanina varð sent út til samgongutingfólk tann 18. oktober í 1999, og fingu flokkarnir freist til 26. oktober at koma við viðmerkingum, men eingin afturmelding kom.

Løgmaður heldur eisini framvegis, at tingfólk hava ábyrgd av pensjónslógini, tí tað er tingið, ið hevur samtykt hana. Hamm heldur ikki, at málið hevur nakað við landsstýrismannaábyrgd at gera.

Drúgv viðgerð er gagnlig
Løgmaður sigur seg halda tað vera ógvuliga gagnligt, at mál verða gjølla og breytt viðgjørd millum áðrenn tey koma í tingið. Hetta, heldur hann, betrar um dygdina á teimum.

Anfinn Kalsberg ásannar tó, at vórðu mál ikki so gjølla viðgjørd áðrenn tey komu í tingið, hevði politiska prosessin gingið skjótari, men setir hann spurnartekin við, um dygdin á endaliga samtyktu lógunum hevði verið í lagi eftir slíka viðgerð.

Løgmaður er skelkaður av útsagnunum hjá Heina O. Heinesen, í Sosialinum í gjár. um, at løgmaður skal leggja upp til einaræði

Ungdómskórið Gjöll

Fríggjakvøldið kl. 19 verður nýggja ungdómskórið "Gjöll" at hoyra í Aulaini í Vestmanna skúla. Kórið er sett saman við fólki úr norður- og suðurstreymoy. Skráin er spennandi og fjølbroytt, eitt sindur jólalig hóast jólini eru farin aftur um bak og okkurt klassiskt er eisini á skránni. Høvuðsverkið verður "Pie Jesu" hjá Andrew Lloyd Webber, tað er úr Requiem. Hetta er fyri kór tveir solistar — sopran og dreingjasopran og klaverfylgispæl, ið Bjarni Restorff fer at taka sær av.

Aurora Borealis
Aurora Borealis er kent fyri sítt fjølbroytta repertoire, heilt frá miðaldar tónleiki til gospel. Kórið hevur longu verið á tveimum uttanlandaferðum. Í Íslandi, Noregi og Danmark. Kórið er nú tódnað til tólv sangarar, so tað meira er átøkt einum vokalbólki í dag.

Dreingja-sopranurin Jan Nicolajsen úr Vestmanna fer at syngja "Pie Jesu" eftir Andrew Lloyd Webber.

Saman við báðum kórunum, fer hin 14 ára gamli vestmenningurin Jan Nicolajsen at syngja "Pie Jesu" úr Requiem hjá Andrew Lloyd Webber. Hann er næmingur í sangi hjá Ólavi Jøkladal og er úrmælingur sum sangari. Saman við honum syngur Randi Fjallsá,ið eisini hevur bæði Purcell og Fauré á skránni, hon er útbúgvin á tónlistaskúla í Belgia. Umframt hesi bæði er Peter Niclasen, tenorur á skránni við Schubert sangum. Kórleiðari er Ólavur Jøkladal.

BROR & SØSTER
JANUAR TILBOÐ
Quiltfrakki v/hettu
Reyður, hvítur, svartur
S-M-L
Fyrr 898.-
NÚ 599.-
Quiltfrakki v/hettu
Reyður, hvítur, svartur
S-M-L
Fyrr 798.-
NÚ 499.-
Quiltvestur v/hettu
Reyður, svartur
S-M-L
Fyrr 488.-
NÚ 299.-
29
Í Tróndargøtu
tel. 318200
Sosialurin - 311820